# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Arnold formaður fyri ferðaleiðarar

TÍÐINDASKRIV

Føroya Ferðaleiðarafelag hevur havt aðalfund og tey, ið nú mynda nevndina eru: Arnold Eyvindsson, formaður, Haldane Joensen, næstformaður, Hilda Thomsen, skrivari/kassameistari

Tiltakslimir eru Karin Andreasen og Ólavur Poulsen

Føroya Ferðaleiðarafelag er felag fyri føroyskar ferðaleiðarar. Vit arbeiða fyri ferðasmiðir, kunningarstovur, virkir og onnur. Eisini fyritøkur og skúlar, ið fáa vitjan uttaneftir ella gera eina útferð fyri starvsfólkið, brúka ferðaleiðarar. Tað kemur eisini fyri at privatfólk senda boð eftir okkum. Vit gera ikki bert útferðir í bussum, men eisini gongutúrar, fiskitúrar og vísa runt inni á søvnum.



*Arnold Eyvindsson, formaður í Føroya Ferðaleiðarafelag*

Felagið hevur í løtuni 55 limir og kunnu vit veita tænastu á nærum øllum evropeiskum málum og innan øll áhugamál, so sum náttúra, fuglar, plantur o.a.

Avgjørt er at halda altjóða ferðaleiðaradagin flaggdagin 25.apríl.

Aftaná flaggdagshaldið á Vaglinum í Havn verða 3 ymiskir túrar við ferðaleiðara, hvør umleið 1 tíma:

Frá Gamla Bókhandli út í Tinganes

Frá standmyndini (Nólsoyar Páll) í Vágsbotni í vesturbýin

Av Kongaminni oman á Kongabrúnna, "I kongens fodspor"

Vit vóna at nógv fara at nýta hetta høvi at hoyra meira um Havnina.

†

## Andlát og jarðarferðir

Karl Mortensen, Toftalíð í Vági, andaðist grækarismessudag, 70 ára gamal.

**Jonhild Henriksen í Gerðum**, Klaksvík andaðist mánakvøldið á Norðoya Røktarheimi, 90 ára gomul.

**Herdis Debes, ættað frá Gjógv**, búsitandi í Keflavík, andaðist á sjúkrahúsinum í Keflavík leygardagin 11. mars, 67 ára gomul.

Kistan við **Onnu Mariu Nystrøm** fer úr landssjúkrahúskapellinum mikudagin kl. 15 til Dúgvuna kl. 17. Jarðarferðin verður úr Betesta hósdagin kl. 13.30. Tey ið vilja minnast Onnu Mariu kunnu lata eina peningagávu til barnalegurnar á Austjørn. Konto í Norðoya Sparikassa.

## Tilhaldshús hjá gjáarfólki í Funningi



*Hans Edvard Joensen á trappuni við húsini hjá Óla hjá Sissal og Lenu, sum vóru fyrstu tilhaldshús hjá teimum Heimi í Horni*



*Húsini hjá Fridu og Villa. Aftan fyri hómast húsini hjá Elly*

Tað hevur allar tíðir verið tætt samband millum grannabygdirnar Funning og Gjógv. Bygdirnar vóru felags um Funnings kirkju, til kirkja kom við Gjógv í 1929. Kirkjugarðurin við Gjógv kom tó í 1919, so fyri ta tíð hava allar kirkjuligar handlingar verið í Funningi.

Tað gekk alt fyri seg í Funnings kirkju: Barnadópur, konfirmatión, brúðarvígsla, jarðarferð, altargongd og vanlig kirkjugongd.

Henda kirkjuliga støða hevði m.a. tað við sær, at hvørt hús við Gjógv hevði eitt fast tilhaldshús í Funningi.

Har skuldi skiftast á nýføðinginum og klæðast til dópshandlingina – har skuldi brúðarparið klæðast til vígsluna – har skuldi skiftast til gongutúrin bygdanna millum, tí ikki bleiv gingið í altarsklæðum í vánaligum líkindum.

Hjá okkum Heimi í Horni, við Gjógv, var tilhaldshúsið hjá Óla hjá Sissali og Lenu í Hoygarðinum.

Viðmerkjast má eisini, at tilhaldshúsini eisini vóru dúgliga vitjað, eftir at kirkja kom til Gjáar, so vit Heimi í Horni – líkasum øll onnur gjáarfólk – trúliga hildu henda góða og gamla kennskapin við líka. Blíðskapur og trúfesti myndaðu framvegis hvørja einastu vitjan.

Men so kom vegasamband bygdanna millum fyrst í sekstiárunum – alt gott um tað – men við vegasambandinum gjørdist tíverri munandi longri millum vitjanirnar, og nú situr tú nærmast bara eftir við teimum góðu minnunum.

Tað vóru sjálvsagt ikki øll, ið av elli og øðrum veikleikum, settu seg føran fyri at fara tann langa vegin til Funnings í kirkju. Kortini royndu tey at ragga sær heim undir Kirkjustein á Hóvabrekku – haðani Funnings kirkja sæst – soleiðis at hvør í sínum lagi fekk eina stilla stund undir steininum, lítandi at kirkjuni.

Pyntisteinur við Gjáarportrið (á bygdargarðinum í Funningi) má eisini fáa nøkur fá orð, tí við henda steinin skiftu summi skógvar og hampaðu seg, áðrenn tey settu beina kós í kirkjuna.

### Kirkjugangskonur o.a.

Í Funnings kirkju er stólur í forkirkjuni, sum var ætlaður kirkjugangskonunum. Hevði kona føtt barn, setti hon seg í henda stólin, og har sat hon, til alt hitt kirkjufólkið hevði sett seg í kirkjuni. Síðani kom prestur út eftir henni og leiddi hana inn í sín fasta stól.

Í Gjáar kirkju er eingin kirkjugangsstólur, men Jóhanna í Geil, frá Gjógv, segði mær, at mamma (Anna Sofía) hevur verið einasta kirkjugangskona í Gjáar kirkju, og var hetta í sambandi við, at eg var føddur 20. februar 1929.

Í hesum sambandi má eg eisini nevna, at eg eri fyrsta barn, ið er doypt í Gjáar kirkju.

Sum dømi um, hvussu skjótt tey gomlu vildu hava barnið doypt, fari eg at enda at skoyta uppí, at Poul Jóhannes, elsti bróðir mín, ið var føddur 20. august í 1920, longu fór til dópin í Funnings kirkju 27. august – eina viku gamal – so tað kom ikki so sjáldan fyri, at dópsbarn frá Gjógv fekk mjólk frá funningskonu, ið sjálv hevði barn á brósti.

*Hans Edvard Joensen,*
*við Gjógv*

## Góð gomul minnir úr Funningi

***Lag:*** *So rótleyst er sinni títt, altíð á ferð*

*Tað nyttar ei longur at banka uppá,*
*tað svarar tær eingin har innanífrá.*
*Tað nyttar ei heldur, um dunk gerast stinn,*
*tú fært ikki svarið: "Vælsignað, kom inn!"*

*Tá Lena bleiv eldri, hon fór heimanfrá*
*– yvir til Elly – og vit aftaná.*
*Tað var eingin broyting, har heimhiti var.*
*Ja, minnini dvølja við báðar tvær.*

*Tá tær vóru farnar, vit fóru um veg,*
*inni hjá Fridu tú væl kennnir teg,*
*hon prátar og stákast, til vatn kókað er,*
*og kaffi og kakur á borðið ber.*

*Nú hvíla tær allar í moldum í frið –*
*og Óli og Jákup og Viljormur við.*
*Gud gev os at samlast í Guds himla sal,*
*og hoyra Gud siga: "Vit kennast jú væl!"*

Við Gjógv um grækarismessuleitið 2006.
**Hans Edvard Joensen**

**Dagurin í morgin**

**16. mars. Gudmundur**, deyður í 1237. Biskupur á Hólum í Íslandi. Fyri undirgerðir, sum hendu við grøv hansara, varð hann skírdur halgimenni. Norrønt navn, ið merkir Guð og verndari.